Bilar
- serblað
í Sosialinum
14. mai 2005:

**Blaðfólk:**
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tel.: 341844 - 216135

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tel.: 341830 - 216409

**Myndafólk:**
Jens Kristian Vang
Bárður Lydersen

**Lýsingar:**
Fríðtór Debes
fridtor@foroyaprent.fo

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Umbróting:**
Sp/f Sosialurin

**Prent:**
P/F Prentmiðstøðin

**Upplag:**
10.000

**Evstamark:**
11. mai 2005



Oddagrein:

# Fyrilit og virðing skapar tryggleika

– Fram kemur hann, ið hóvliga fer, sigur eitt gamalt orð. At hetta er so satt, sum tað er sagt, kunnu vit øll samtykkjandi nikka ja til. Men kortini munnu flestu okkara á onkrum sinni hava gjørt okkum sek í ikki at virða hetta orðið.

Á hvørjum ári krevur ferðslan alt ov mong mannalív – og næstan altíð kunnu vit eftirrationalisendi vísa á, at um fram varð farið øðrvísi, hevði skaðin ikki verið so stórur.

Ferð, rúsdrekka og kleyvarskapur eru størsta hóttanin, og okkara ungdómur er størsti vandabólkurin. Seinastu tíðina hevur nógv verið røtt um, hvørt vit skulu seta eina skaðanevnd at kanna allar álvarsamar vanlukkur – til tess at vit kunnu læra av mistøkunum, soleiðis at tey ikki verða endurtikin. Ferðslutrygd hevur ikki vunnið ljóð fyri hesum sjónarmiði – enn, men vónandi dugir politiski myndugleikin at síggja virði í slíkum.

Tað er ein sannroynd, at vit við royndum og upplivingum best læra, hvussu vit skulu føra okkum gjøgnum vandastøður í ferðsluni. Um so var, at álvarsomu vanlukkurnar vórðu skrásettar, soleiðis at vit øll, sum ferðast í ferðsluni, kundu endurupplivað tær, høvdu vit uttan iva fingið stórt gagn av hesum.

Tað tykist tó mangan, at slíkt bara verður til tos. Hóast Ferðslutrygd í fleiri ár hevur roynt at vunnið ljóð fyri nullhugsjónini á tingi – og hóast politiski myndugleikin hevur tikið hesa bæriligu hugsjón til sín – so tykist boðskapurin kortini ikki heilhjartaður at treingja ígjøgnum.

Eitt annað mál, sum vit her í blaðnum hava umrøtt fyrr í ár, var at gera eina koyritekniska breyt, har vit kundu vant ymsar vandastøður í ferðsluni undir tryggum umstøðum. Bilredaktiónin hjá Sosialinum var í Noreg í januarmánaði og royndi eina slíka breyt – sum hvør einasti bilførari í landinum eisini átti at roynt.

Men alt snýr seg um hugburð – og um at sýna fyrilit, so vit ikki óntolnast og illneitast inn á aðrar bilførarar. Vit kundu tikið til okkum tríggjar tummilfingrareglar: Bilurin skal hava trygt vegtak, tryggja tær tí, at dekk eru í lagi og hóskandi til koyrilíkindini! Ferðin drepur, minka ferðina! Rúsdrekka drepur, koyr ikki ávirkaður!

# Ferðslutrygd við í Fólkaheilsuætlanina



*Tað er neyðugt at vit gera okkum greitt, at í dag er tað ferðslan, sum er størsti vandin móti fólkaheilsuni*

*savnsmynd Jens Kristian Vang*

**Nú vit eru í ferð við at orða eina Fólkaheilsuætlan er ógvuliga umráðandi, at ferðslutrygdin verður tikin við í ætlanina. Longu í 1997 mælti ein OECD frágreiðing til, at ferðsluvanlukkur verða greinaðar sum ein ræðandi heilsuvandi**

*Rúna Sivertsen*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*
*runa@kallnet.fo*

Ferðsluvanlukkur krevja líka nógv mist liviár og nærum líka nógvar skaðar og sjúkudagar, sum nógvir aðrir heilsutrupulleikar.

Vandin fyri at verða skaddur í ferðsluni er 30 ferðir størri enn í arbeiðinum innan ídnaðin.

Hetta eru ræðandi niðurstøðurnar í eini OECD frágreiðing, sum varð almannakunngjørd fyri 8 árum síðani.

Tað hevur tikið sína tíð at fingið politikarar kring heimin at fata, hvussu nógv ferðslan í veruleikanum krevur.

Men so við og við, hava flestu lond tikið hetta í fullum álvara og hava sett sær fyri at gera alt, sum gerast kann, fyri at koma hesum vanda til lívs.

Nýliga kom heilsuøkið í Noregi við í ferðslutrygdararbeiðið, og har eru ferðsluvanlukkurnar alsamt minkandi.

Ein arbeiðsbólkur varð settur at orða eina Fólkaheilsuætlan fyri Føroyar.

Við í arbeiðsbólkinum hava verið umboð fyri deildina fyri arbeiðs- og umhvørvisheilsu, kommunulæknafelagið, fyribyrgingarráðið, heilsufrøðisskipanina, landslæknin umframt landstýrismannin í almanna- og heilsumálum.

Fyribyrgingarráðið, sum skal upplýsa og ávara um ferðsluvandarnar, nevniliga Ráðið fyri Ferðslutrygd, var tíverri ikki við í arbeiðsbólkinum.

Tað er neyðugt at vit gera okkum greitt, at í dag er tað ferðslan, sum er størsti vandin móti fólkaheilsuni.

Og í arbeiðinum at basa hesum vanda, eigur Ráðið fyri Ferðslutrygd sjálvsagt at hava ein eyðsýndan leiklut.

Síðani 1995 hevur Sosialurin havt fastan bilateig í blaðnum. Teigurin er í blaðnum hvønn hósdag. Endamálið er at kunna um tað nýggjasta á bilamarknaðinum, at upplýsa um bilar og bilasøgu annars, um bilastarvsgreinina og um ferðslutrygd.

Síðani 2000 hevur Sosialurin á hvørjum árið givið út serbløð um bilar, nevnt Bilar.

© Sosialurin 2005